JØRN JENSEN

# Smakka maðkar væl?



Kári og Una sita
á einum bonki.
Tey keða seg.

So kemur ein fuglur.
Hann setir seg á vøllin.

Una hyggur at honum.
„Uff.
Hann át ein maðk.“

Fuglurin etur
ein maðk afturat.

„Úlakk," sigur Kári.
„Sást tú hatta?

Hann át maðkin.
Við mold á."

„Og slími," sigur Una.
„Eru maðkar eitrandi?"

„Nei," sigur Kári.
„Tað haldi eg ikki.

Fuglar eta maðkar.
Teimum dámar teir."

„Hvussu smakka maðkar?“
spyr Una.

„Av maðkum,“ sigur Kári.

„Hevur tú etið nakran?“
spyr Una.

„Nei,“ sigur Kári.
„Tað havi eg ikki.
Tað er vamlisligt.“



So síggja tey Óla.
Hann feiar.

Óli hevur ikki sæð tey.
Honum dámar ikki børn
og als ikki Kára.

Kári flennir.
„Man Óla dáma maðkar?“

„Tað veit eg ikki,“
sigur Una.
„Vit kunnu spyrja hann.“

„Nú veit eg,“ sigur Kári.
„Vit geva honum ein maðk.“

„Tú ert svakur,“ sigur Una.
„Hann fer ikki at eta hann.“

„Jú,“ sigur Kári.
„Vit lumpa hann.

Kom við.“





Kári grevur maðkar upp.
Fleiri stórar maðkar.

So fara tey heim til hansara.
Tey vaska maðkarnar.

Kári tekur eina pannu.
So steikja tey maðkarnar.

Tað luktar illa.
Øgiliga illa.

Kári sker teir sundur.
Una rullar teir í sukri.

Nú eru maðkarnir fínir.
Teir eru leskiligir.
Teir líkjast bommum.

Kári tekur eitt fat.
Hann leggur maðkarnar á tað.

Kári flennir:
„Eg havi nøkur gummi-bomm.

Vit leggja tey eisini á fatið.
Nú fara vit at leita eftir Óla.“

Una tekur fatið.
Tey fara út í garðin.

Óli er har enn.

Hann sær tey beinanvegin.
„Hey, tit bæði.
Hvat hava tit har?“

Una rættir honum fatið.
„Vit hava bomm.
Vilt tú hava?“

„Bomm," sigur Óli.
„Tað veit eg ikki."

„Fá tær," sigur Kári.
„Tey smakka væl."





Óli hyggur at bommunum.
„Hvat slag av bommum?"

Kári peikar:
„Hasi brúnu eru gummibomm.
Tey hvítu eru maðkar."

„Gummibomm,“ sigur Óli.
„Tey havi eg smakkað fyrr.

Eg fái mær ein maðk.“

Óli koyrir maðkin í munnin.
Hann tyggur.

„Úlakk,“ rópar hann.
„Hetta er ein maðkur.“

„Ja,“ sigur Kári.
„Tað segði eg eisini.“



So renna tey.
Tey goyma seg.

Óli leitar eftir teimum.

Hann er súrur.
Nei.
Hann er illur.

Men hann finnur tey ikki.

Nú vita tey,
at maðkar ikki smakka væl.